# Lærari umborð á »Afri

**35 ára gamli Jóhan Petur Johannesen hevur verið lærari umborð á hjálparskipunum »Anastasis« og »Africa Mercy«. Fyri føroyska læraran hevur verið talan um eitt sera læruríkt tíðarskeið í einum altjóða skipaumhvørvi, og í einari fremmandari mentan í Liberia og Ghana**




*Jóhan Petur Johannesen frammanfyri »Africa Mercy«*

## Hjálpararbeiði



**Heri Simonsen**
heris@sosialurin.fo

Í 2006 fór Jóhan Petur Johannesen til Afrika at starvast, sum lærari umborð á hjálparskipinum »Anastasis«. Anastasis vitjaði í Føroyum í 1990, og aftur í 2004. Jóhan Petur fekk farloyvið frá sínum starvi, sum lærari á Eysturskúlanum í Havn. Eitt ár seinni hevði »Anastasis« siglt sína síðstu ferð í tænastuni at geva afrikanarum heilsubót, og at boða teimum tann kristna gleðiboðskapin. Jóhan Petur segði upp á Eysturskúlanum í 2008, og fór at undirvísa umborð á tí nýggja skipinum hjá kristna hjálparfelagsskapinum, »Mercy Ships«, sum nevnist »Africa Mercy«. Jóhan Petur hevur skrivað søgu, við at verða lærarin, sum hevði síðsta undirvísingartíman umborð á Anastasis, og tann fyrsta undirvísingartíman umborð á Africa Mercy. Í samfull 2 ár og 4 mánaðir hevur Jóhan Petur starvast hjá Mercy Ships. Honum stendur í boði at sleppa at starvast aftur umborð á Africa Mercy, men hann hevur biðið um eina umhugsunnartíð uppá 2 mánaðir, áðrenn hann tekur eina endaliga avgerð. Hesar 2 mánaðarnir er hann fyribils í starvi, sum vikarur á Eysturskúlanum.

### Veita hjálp og linna

Jóhan Petur greiður frá: - Mercy Ships – miskunnarskip – er ein felagsskapur, sum ynskir at veita hjálp og linna til neyðstødd fólk. Enska herrrópið hjá felagsskapinum er: »To serve the forgotten, poor and needy« – at tæna teimum, sum eru gloymd, fátøk og sum tørva hjálp. Av tí, at tørvurin er so stórur í Vestur-Afrika, so hevur felagsskapurin valt at fokusera nógv uppá henda partin av Afrika seinnu árini, men ætlanin hjá Mercy Ships er eisini at fara til onnur støð í Heiminum. Felagsskapurin virkar eisini í tí karabiska havinum, einamest í tí Dominikanska Lýðveldinum. Felagsskapurin var stovnaður í 1978 av einum amerikumanni, sum nevnist Don Stephens. Ein av orsøkunum til, at Don og konan, Deyon Stephens stovnaðu Mercy Ships, var tí tey áttu ein menningartarnaðan son, sum eitur John Paul. Tey sóu hvussu torført lívið kundi verða fyri sonin, og tá hugsaðu tey um hvussu nógv børn tað eru kring Heimin, sum ikki hava umstøður til at fáa nakra hjálp. Hetta vakti nakað í Stephens-hjúnunum, at tey vildu gera nakað fyri tey neyðstøddu í Heiminum. Hjúnini vóru insperaði av bæði søguligum persónum, og eisini av Jesusi sjálvum. Móðir Teresa er eisini ein av inspirasjónskeldunum hjá Mercy Ships. Vit tosa um "The two hands of the Gospel" – báðar hendurnar hjá Gleðiboðskapinum. Bæði at vísa menniskjum likamligam linna, og at vísa umsorg fyri teimum. At vísa menniskjum, at tey eisini hava eitt virðið. Tað er nógv menniskju, sum halda, at tey einki virðið hava. Men so royna vit at greiða teimum frá: "Jú! Tú hevur virðið, og tað er ein, sum hevur umsorgan fyri tykkum, og tað er Gud.". Undirstrikar Jóhan Petur.

### Segði trygt starv frá sær

Spurdur hví hann valdi fyrst at fara í farloyvi, og síðani at siga eitt trygt starv á Eysturskúlanum frá sær, fyri at fara til Afrika? Til hetta svarar Jóhan Petur, at tá hann gjørdist varugur við tørvin, sum er í Heiminum, og tá hann sá, at tað eru so mong, sum ongan góðan eiga, so kendi hann seg kallaðan at fara við Mercy Ships. Jóhan Petur heldur, at hann hevur verið ógvuliga priviligeraður her í lívinum. Hann hevur havt góð foreldur, góðan uppvøkstur, ríkar upplivingar og góð størv. Men hann kendi á sær, at hann skuldi brúka nøkur ár fyri at hjálpa øðrum menniskjum. Jóhan Petur bar heldur ongan ótta fyri at fara ta longu leið til Afrika. Fyri at sleppa við einum skipi, sum Africa Mercy krevst sjálvsagt ein heilsuváttan frá læknanum. Dygdargóðir førleikar í enskum krevjast eisini fyri at kunna gerast eitt av starvsfólkunum umborð á skipinum. Fyri at gerast lærari umborð á einum skipi hjá Mercy Ships, krevst eisini, at ein er fakliga væl fyri, tá tað kemur til bíbliuundirvísing. Jóhan Petur var á ungum árum á bíbliuskúla hjá felagsskapinum »Youth With a Mission«, og var tað ein fullgóð váttan fyri Mercy Ships. Avgerandi er eisini, at tørvur er á fólki innan tað rætta fakið. Og tey stóðu og manglaðu lærarar umborð á Anastasis.



*Jonhard Joensen av Strondum, sum var skipari umborð á Anastasis, saman við konuni, Debbie, og børnunum, Steffan og Rebekka*

### Rektari frá Harrow

Umborð á Anastasis og Africa Mercy hevur Jòhan Petur so undirvíst børnum, sum hava sítt upphav í nógvum ymiskum londum. Hóast langt frá øll hava